

## Búgvi um politikk

- Eg fylgi als ikki við í politikki. Tað sigur mær einki. Men eg helli til tó til fullveldið, um tú spyrt meg um mína politisku støðu. Tað er meira verdugt at standa á egnum beinum

## Búgvi um skúlan

- Eg gjørdi mær og læraranum eina tænastu, tá ið eg fór úr skúlanum. Eg var ein buldribassi og kláraði meg ikki so væl í skúlanum. Tað var tó gott at kunnu vinna ein sigur í ítróttinum, tá ið tað ikki gekk so væl í skúlanum. Nú gangi eg aftur í skúla, men hesaferð er tað øðrvísi. Eg havi eina aðra støðu til skúlan, og skúlin er eisini meira praktiskur

# Búgvi Poulsen: - Venjing I

**Havnarmaðurin Búgvi Poulsen er helst tann besti judoíðkarin úr Føroyum nakrantíð. Hann hevur vunnið DM og hevur eisini fingið heiðursmerki til fleiri altjóða kappingar. Nú hevur Búgvi sett búgv í Gøtugjógv, og hann hevur ikki ætlanir um at gevast enn. Hann nýtir eisini nógva tíð til róging, har ið úrslitini eisini hava verið góð. – Tíðin, sum tú nýtir til at venja, skal leggjast afturat samlaða livialdurin, sigur Búgvi**

## Ítróttarprofilurin



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Búgvi Poulsen er ein av okkara fremstu ítróttarmonnum. Tað er fáur føroyingur, sum hevur megnað at fingið slíkan heiður í altjóða kappingum, sum Búgvi hevur megnað.

Hóast hetta er hann kanska ikki so kendur fyri tann vanliga føroyingin. Hetta er helst tí, at hann íðkar judo, og tann ítróttargreinin vekur helst ikki so stóran ans, sum summar aðrar ítróttargreinir gera.

Tað er tó eingin ivi ímillum judoíðkarar og fólk, sum hava skil fyri ítróttinum, at Búgvi er besti føroyski judoíðkari nakrantíð.

Búgvi rør eisini, og har hevur hann eisini vunnið heiðursmerki – bæði í vanligum róðri og í inniróðri.

### Dugdi ikki at sparka

Búgvi er uppvaksin í Havn. Hann tímdi ikki nakað bóltspæl, og tí valdi hann heldur judo. Hann var ikki heilt ungur, tá ið hann byrjaði at íðka judo.

- Tað lá ikki fyri hjá mær at sparka bólt. Eg bleiv altíð valdur frá í skúlagarðinum, tá ið vit sparkaðu í steðginum, sigur Búgvi og flennir

- Eg byrjaði at íðka judo sum 12 ára gamal, og tað lá væl fyri beinanvegin. Eg bleiv nummar tvey í fyrstu føroyameistarakapping, eg var við í, og so vann eg allar hinar kappingarnar, sum eg luttók í, inntil eg fór niður í 1994, sigur hann.

Búgvi gavst í skúlanum eftir 9. flokk. Hann fór síðani til skips og fór so í læru sum timburmaður. Í 1994 fór hann til Danmarkar at arbeiða. Har var hann í 7 ár, áðrenn hann og unnustan, Marilyn, fluttu heim til Gøtu.

- Eg møtti Marilyn niðri. Hon gekk í skúla niðri, meðan eg arbeiddi, sigur Búgvi.

### Var danmarksmeistari í judo

Búgvi gjørdi nógv við judo, meðan hann var niðri, og hann vann sær eisini nógv heiðursmerki.

- Eg vandi við ymiskum feløgum niðri. Longsta tíðarskeiðið var eg við Hillerød Judoklub. Eg luttók fyrstu ferð í DM í 1994. Tá gjørdist



eg nummar trý. Eftir hetta gjørdist eg tíverri skaddur, og eg kom ikki ordiliga fyri meg aftur fyrr enn í 1998, tá ið eg vann DM. Tað var eitt av hæddarpunktunum í mínum ítróttarlívi, sigur Búgvi.

- Eg havi luttikið tvær ferðir í EM og hava eisini verið við til NM. Eg gjørdist tvær ferðir nummar trý til NM, og tað meti eg eisini sum góð úrslit, sigur Búgvi.

### Rógving gav nýggjar avbjóðingar

Eftir at Búgvi flutti heim til Føroya, vóru avbjóðingarnar innan judo ikki so nógvar. Hann hevur tó íðkað eitt sindur judo og eisini verið venjari hjá øðrum. Men hann hevur eisini nýtt nógva tíð til rógving.

- Judo í Føroyum var eitt sindur ov lítið til mín, so eg fór at rógva, tí at eg vildi hava eina nýggja avbjóðing. Eg róði við Havnarbátinum, og har gjørdust vit føroyameistarar í 2004. Tað var ein fantastisk løta. Vit vunnu tepurt á ólavsøku, og gleðisrúsurin var øgiligur, sigur Búgvi.

Búgvi hevur róð inniróður um veturin, tá ið kapproðurin liggur stillur.

### Nýtur nógva tíð til ítrótt

Unnustan Marilyn kann skriva undir uppá, at Búgvi hevur nýtt nógva tíð og orku uppá ítrótt.